

# Toyota Previa brýtur upp úr nýggjum

BILAR
*Eirikur Lindenskov*

Tann nýggi Toyota Previa er bygdur upp á eina stolta traditión. Fyrsta ættarliðið av Previa breyt upp úr nýggjum, tá talan var um pláss, koyrieginleikar og snið. Bæði sum MPV og sum van. Og viljin til at endurtaka listarverkið hevur hevur verið drívmegin hjá teknarum og verkfrøðingunum hjá Toyota – líka frá tí, at fyrstu skitsurnar lógu á borðinum.

Úrslitið av øllum hesum er, at Previa longu frá byrjan hevur fyrimunir fram um aðrar – bæði tá tað snýr seg um teknik og design.

Sniðið bendir hugin á tað sportliga, og 2,4 litra VVT-i-motorurin prógvar hetta.

VVT-i-tøknin hjá Toyota hevur vunnið altjóða viðurkenning fyri sameiningina av hestakreftum og dreiningsmomenti – og fyri framúr góðari bensinnýtslu. 2.4 litra motorurin veitir 156 HK og hevur eitt dreiningsmoment upp á 225 Nm við 4.000 snúningum.

Previa fæst eisini við 2.0 litra D-4D commmonrail turbodiesel motori bæði til MPV og til vanútgávurnar.

Tann nýggi commonrail turbodiesel motorurin veitir 116 HK við 4.000 snún./min og eitt dreiningsmoment er upp á 250 Nm við 1.800 til 3.000 snún./min.




# T Sport - ein sportligur bilur í kompaktflokkinum

**Eitt nýtt Sport-ættarlið hjá Toyota er á veg. Navnið er T-Sport. Higartil eru komnir Yaris og Celica undir hesum heiti – og í næstum kemur Avensis eisini**

BILAR
*Eirikur Lindenskov*

Innan bilaítróttin hevur Toyota fyri størsta partin gjørt um seg innan rally, ChampCar og í tí vælkendu 24-tíma kappingini í Le Mans. Í komandi ári verður Toyota eisini at síggja í Formel 1

At motorítróttur og Toyota hava nakað við hvørt annan at gera, leggur Toyota nú dent á við nýggja eftirnavninum, T-Sport. Yaris og Celica eru komnir í hesum útgávum, og Corolla er á veg.

Men hvat kunnu vit vænta okkum av einum Toyota modelli við eftirnavninum T-Sport?

– Sum navnið bendir á, er talan um ein serliga sportútgávu. Tað vil m. a. siga, at motorurin er eitt sindur sterkari, at undirvognurin er eitt sindur strammari og at designið hevur eitt meira »sportligt« snið. Emblemið, sum er at síggja á hesum nýggju útgávunum, er eisini sermerkt, og tað fara fólk, ið hava hug á kvikum og skjótum bilum at leggja til merkis.

Yaris er ein av teimum bilunum í nýggjari tíð, ið hevur vunnið fleiri virðislønir. Eitt nú varð hann kosin ársins bilur í ár 2000 í Evropa og í Japan, og Euro-NCAP skírdi hann sum tryggasta bilin í flokkinum.

– Allar hesar eginleikar hevur Yaris T-Sport sjálvandi eisini – og sjálvandi eisini nakað meira enn tað, sigur Eyðun Lisberg, sølumaður hjá Reyni Service, føroyska Toyotaumboðnum.

Tann nýggi Yaris T-Sport er sermerktur við dynamiska designinum: Hann er senkaður 12 mm, hann hevur gáttvíðkarar og 15” alufelgur við lágprofildekkum.

Framman er ein serlig sportgrill, og so hevur hann eisini sergjørdar kúfangarar við innbygdum tokulyktum. Og vanliga digitala instrumenteringin í Yaris er skift út við analog instrument við hvítum botni. Aftur at hesum koma setur, róður og gearstong í sportdesigni.

– Talan er um ein skjótan bil. Toppferðin er 190 km/t, og hann akselererar frá 0 til 100 km/t upp á bert 9.0 sekund. Tá hugsað verður um, at bilurin klárar at koyra 14.4 km/l er hetta enn meira hugvekjandi.

VVT-tøknin hjá Toyota er eisini sera áhugaverd, tí hon veitir nógva motororku við lítlari bensinnýtslu. Yaris T Sport er útgjørdur við einum 1.5 litur VVT-i-motori við 106 hk.

Toyota Yaris T Sport hevur sera gott upptrekk og er sera kvikur í yvirhálingum. Fjaðringin og stoytdoyvingin er kontant men kennist rættuliga lagalig

Lágprofildekkini gera, at bilurin hevur gott vegtak. Skrokkurin er á serligan hátt stívaður, so bilurin betur megnar at snúgva sær í serligum førum.

Fyri at siga tað stutt: Yaris T Sport er eitt gott boð upp á ein sportsligan bil í kompaktflokkinum..



*Tá vit tosa um Toyota Yaris T Sport er talan um ein skjótan bil. Toppferðin er 190 km/t, og hann akselererar frá 0 til 100 km/t upp á bert 9.0 sekund. Tá hugsað verður um, at bilurin klárar at koyra 14.4 km/l er hetta enn meira hugvekjandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Avensis Verso – nýggja MPV-boðið

**Avensis Verso er nýggja og spennandi boðið upp á ein MPV frá Toyota**

BILASØLA
*Eirikur Lindenskov*

Eitt nýggjur og spennandi Toyota er á veg. Hann eitur Avensis Verso, og sum fornavnið gevur eina ábending um, so er bilurin í familju við Avensis. Samstundis ber eftirnavnið boð um fjølbroytni í víðastu merking, eins og í vældámda Yaris Verso.

Avensis verður eitt nýtt og spennandi boð upp á ein MPV frá Toyota. Ein sermerktur bilur havandi snið og nýtslu í huga. Bilurin fæst við ymsum motorum: 2.0 litur VVT-i-motorur og tann nógv rósti 2.0 D-4D common-rail turbodiesel.

Tann nýggi Avensis Verso heldur ikki nógvan gang, og hann verður mettur at verða ein ein konfortabul bilur, bæði til býarkoyring og koyring á motorvegnum. Samstundis er hann bæði rúmligur og fjølbroyttur, so hann kann innrættast júst so, sum tær tørvar hann. Skalt tú í summarfrí við familjuni, ella skal tú flyta borð og stólar, ella ein túr niðan á Sandvíkarhjalla… Avensis Verso kann brúkast til allar uppgávur.

Sum ein veruligur MPV klárar Avensis Verso stórt sæð allar tær flutningsuppgávur, tær tørvar. Avensis Verso verður helst at fáa í tveimum útgávum, við ávikavist seks og sjey støkum setrum.

Avensis Verso verður at fáa bæði sum persónbilur og sum vøruvognur. Her skal hann lyfta arvin eftir SportsVan, sum er tann vørubilurin, sum vinnulívinum hevur tókt best um.

Avensis Verso Van førir víðari vælkendu komfortina og virknistryggleikan, sum sportsVan hevði, um enn á einum hægri støði.



